Kappingareftirlitið

Sandavágs Timburhandil
Hillingatangi 6-8
360 Sandavágur

Att. Albert Ari Thomassen

Tórshavn, tann 12-03-2025

Viðv. mál nr.: 24/00448

Kappingareftirlitið fekk tann 17. februar 2025 einfalda fráboðan, sbrt. § 16, stk. 1, í kappingarlógini, um, at P/f Sandavágs Timburhandil yvirtekur Uno Sp/f. Talan er um eina vantandi fráboðan, har felagið eftirfylgjandi hevur fráboðað Kappingareftirlitinum um yvirtøkuna.

Talan er um eina transaktión sum kemur undir samanleggingarhugtakið í §13, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini. Talan er um eina samanlegging eftir §13, stk. 1, nr. 2 tá ið ein ella fleiri persónar, sum longu hava ræðið á minst einari fyritøku, ella tá ið ein ella fleiri fyritøkur við keypi av pørtum ella ognum gjøgnum avtalu ella á annan hátt fáa beinleiðis ella óbeinleiðis ræði á allari ella pørtum av einari ella fleiri fyritøkum afturat.

Samanleggingin skal fráboðast, sbrt. §16, stk. 1 í kappingarlógini, tí tær luttakandi fyritøkurnar samanlagt hava ein árligan umsetning á í minsta lagi 75 milliónir krónur í Føroyum, og minst tvær av luttakandi fyritøkunum hvør sær hava ein samlaðan árligan umsetning upp á 15 milliónir krónur í Føroyum, sbrt. §14, stk. 1, nr. 1, í kappingarlógini.

Luttakandi fyritøkur hava fráboðað eftir einfaldum leisti, tí ongin av luttakandi fyritøkunum virka á saman vøru- og landafrøðiliga marknað og ongin av luttakandi fyritøkum eru á einum ovara ella niðara marknað til ein marknað har onnur luttakandi fyritøka er virkin, sbrt. §3, stk. reglugerð nr. 2 frá 3. januar 2025.

P/f Sandavágs Timburhandil byrjaði sum ein av høvuðsveitarunum til byggivinnuna í nærumhvørvinum í Vágunum. Virksemið er tey seinastu árinið víðka og veitir Sandavágs Timburhandil í dag tænastur sum veitari innan bygging kring Føroyar.

Uno Sp/f byrjaði sum ein súkkluhandil, men varð síðani broytt til ein handil sum seldi køkar og tí sum har tilhoyrir. Í 2019 fekk Sp/f Uno umboð fyri Skousen, sum var lagt aftrat virkseminum.

Yvirtøkan er skipa á tann hátt, at køks deildin hjá Sp/f Uno verður partur av P/f Sandavágs Timburhandil, meðan Skousen framhaldandi ferð at virka undir egnum navnið og egnari tænastudeild í Smiðjugerði. Keypsprísurin er **[...]** kr.

Kappingareftirlitið

Kappingareftirlitið hevur við heimild í § 15, stk. 5, í kappingarlógini, tikið avgerð um, at góðkenna keypi hjá P/f Sandavágs Timburhandil av Uno Sp/f, vísandi til § 15, stk. 2, í kappingarlógini um at ein yvirtøka, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, skal góðkennast.

Vegna

Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
Deildarstjóri

Teitur Fríduson Andreasen
Fulltrúi